# Hugnalig løta niðri á Støðni

**Rituvík:** Seinasta leygarkvøld varð skipað fyri mentanartiltaki á Støðni í Rituvík.

Væl av fólki var samankomið til tiltakið, ið var merkt av sangi, talu, mati og hugnaligum práti manna millum.

Sum greitt varð frá í blaðnum í gjár helt Dánjal Petur Højgaard eina røðu, har hann lýsti bygdarlívið og annað í tí sambandinum. Somuleiðis sungu Susanne og Rúni Brattaberg, eins og Kór Glyvra Kirkju sang nakrar sangir.

Sum myndirnar hjá Tóka Højgaard vísa, so sæst skilliga at fólk tóktust hugnaðu sær óført.



*Bæði børn, ung og tilkomin vóru samankomin til mentanartiltakið*



*Prestur/kórleiðari, borgarstjóri og røðari fegnast um áhugaverda tiltakið - f.v. Meinhard Bjartalíð, Rodmundur Nielsen og Dánjal Petur Højgaard*



*Menn hava nógv at práta um, tá teir soleiðis hittast*



*Á hugnaligu løtuni vórðu eisini tey lokalu ítróttarfólkini frá Oyggjaleikunum heiðrað*



*Fólk í hópatali høvdu leitað sær oman á Støðna. Tey fingu her til fulnar at síggja, hvussu vælegnað hetta staðið er til slík tiltøk*